## Noreg fær skyldina

Fleiri fjølmiðlar í Asia geva Noregi ein part av skyldini av, at uttanríkisráðharrin í Sri Lanka varð myrdur í síðstu viku.

Noreg hevur í fleiri ár roynt semju ímillum srilankisku stjórnina og teir tamilsku uppreistrarmenninar, og teir asiatisku fjølmiðlarnir vilja vera við, at teir norsku semingsmenninir hava verið alt ov lagaligir mótvegis tamilunum. Fjølmiðlarnir siga, at tað var norska vælvildin ímóti tamilunum, sum kostaði Lakshman Kadirgamar, uttanríkisráðharra lívið.

Norska uttanríkisráðið vil ikki gera viðmerkingar til skuldsetingarnar í teimum asiatisku fjølmiðlunum. Bæði Jan Petersen, uttanríkisráðharri, og Vidar Helgesem, semingsmaður, vóru í Colombo í síðstu viku og fylgdu tí myrda uttanríkisráðharranum til gravar. Men teir vildu ikki gera nakrar viðmerkingar til skuldsetingarnar. Sambært norskum fjølmiðlum hevði srilankiski forsetin heitt á teir um ikki at gera nakra viðmerking til tað, sum var komið fram í fjølmiðlunum.

## Skulu velja kyn

Bretska stjórnin umhugsar at geva foreldrum, sum brúka ísáðing, loyvi til at velja, um tey vilja hava ein son ella eina dóttur. Endamálið er at forða fyri, at foreldur fáa bara synir ella bara døtur, skrivar Reuters.

Ætlanin hjá stjórnini hevur fingið nógva umrøðu í bløðunum. Málið var eisini frammi fyri tveimum árum síðani, men ta løgdu politikararnir ætlanina aftur í skuffuna, tí ein kanning vísti, at 80 prosent av bretska fólkinum vóru ímóti at geva foreldrum møguleika at velja, um tey vildu hava drong ella gentu.

Stjórnin vísir á, at galdandi lóg um ísáðing er 15 ára gomul, og at tað er neyðugt at endurskoða hana, tí vísindin hevur gjørt stór framstig, síðani lógin varð smíðað.

Sum er kunnu bretsk foreldur, ið brúka ísáðing, velja kyn, um vandi er fyri, at barnið kann fáa onkra sjúku, ið er tengd at, um tað er drongur ella genta.

## Dýr pensjónsskipan

Eftir áhaldandi kravgongur hevur polska tjóðartingið samtykt eina lóg, sum tryggjar námsarbeiðsmonnum pensjón. Lógin bleiv skundað ígjøgnum tingið, sum júst hevur havt seinasta sín fund undan tjóðartingsvalinum, sum verður tann 25. september.

Lógin sigur, at allir námsarbeiðsmenn hava rætt til pensjón, tá teir hava arbeitt í námsvinnuni í 25 ár, sama hvussu gamlir teir eru. Men fleiri politikarar og búskaparfrøðingar ávara um, at lógin er alt ov kostnaðarmikil. Útrokningar hjá stjórnini hava víst, at tey næstu fimm árini skal ríkiskassin gjalda námsarbeiðsmonnum 18 milliardir zloty ella 33 milliardir krónur í pensjón.

Polski tjóðbankin sigur, at skipanin verður alt ov dýr, og at hon fær óhepnar avleiðingar fyri landsins búskap. Bankin sigur seg eisini bera ótta fyri, at tær stóru útreiðslurnar fara at gera tað trupult hjá Pólandi at sleppa upp í evrusamstarvið.

## Nei til ES

Ein nýggj meiningakanning vísir, at fólk í Norðurnoregi halda ikki, at Noreg sigur at søkja um limaskap í Evropasamveldinum.

Kanningin vísir, at í Finnmørkini taka bara 33 prosent undir við ES-limaskapi, og í Troms og Nordland fær limaskapur undir tøku frá 35 prosentum av veljarunum. Tað merkir, at samanborið við eina tilsvarandi kanning fyri einum lítlum ári síðani er undirtøkan fyri ES minkað í Norðurnoregi, skrivar Nordlys. Fara vit longri aftur, er undirtøkan minkað nógv, tí í 2003 søgdu 48 prosent av teimum spurdu, at Noreg átti at fara upp í ES.

Stórtingsval verður í Noregi í heyst, men fyribils er ES-limaskapur ikki vorðin evni í valstríðnum.

# 17 ósvaraðir spurningar

**Vanlukkan við kýpriska Helios-flogfarinum er ein tann størsta gátan í altjóða flogferðslusøguni. Nógvir spurningar eru ósvaraðir**

FLOGVANLUKKA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Kýpriski forsetin, Tassos Papadopoulos hevur sagt, at teir, sum høvdu skyldina av vanlukkuni, verða avdúkaðir og revsaðir, sama hvørjir teir eru. Men enn er langt á mál.

Flogfarið var av slagnum Boeing, og ein umboðsmaður hjá verksmiðjuni sigur við grikska blaðið TA NEA, at tað eru nógvir spurningar, sum bíða eftir svari. Heru eru 17 teirra:

1. Hvat var tað, sum hendi í flogfarinum, og sum gjørdi, at báðir flogskipararnir mistu ræðið á tí ísenn?
2. Hví fekk stýrimaðurin sær ikki iltmaskuna fyri andlitið, tá flogskiparin fór úr stýrihúsinum?
3. Hvar var flogskiparin, tá tey bæði griksku jagaraflogførini vórðu send at kanna, hvat bagdi kýpriska flogfarinum?
4. Higartil eru líkini av 118 av teimum 121, sum við vóru, funnin? Hví er líkið av flogskiparanum ikki funnið?
5. Hvussu ber tað til, at kýpriska flogfelagið sigur seg ikki vita, hvussu gamlar flogternurnar og tænararnir vóru? Felagið hevur sagt, at tær vóru ímillum 20 og 30 ára gamlar. Visti felagið so lítið um manningina?
6. Hvussu væl kendi manningin neyðhjálparskipanina umborð á flogfarinum?
7. Iltmaskurnar hjá ferðafólkunum duttu niður undan loftinum, tá trýstið fall, soleiðis sum tær eiga at gera. Flogskipararnir høvdu eina eyka iltskipan. Hví virkaði hon ikki?
8. Flogskipararnir mistu ikki vitið beinanvegin av vantandi ilt, og teir skuldu tí havt tíð til at taka flogfarið niður í 12.000 fóta hædd, har nóg mikið er av ilt. Varnaðust teir ikki ávaringarljóðini?
9. Flogfarið datt niður, tí tað hevði einki brennievni eftir, eftir at tað hevði flogið næstan tveir tímar við sjálvsstýrara. Hvussu nógv brennievni fekk flogfarið, áðrenn tað fór á flog úr Larnaka á Kýpros?
10. Flogskipararnir á teimum báðum jagaraflogførunum sóu inn í Helios-flogfarið, sum var í 34.000 fóta hædd tá. Har frystir næstan 60 stig. Hvussu ber tað til, at frost ikki hevði lagt seg á vindeyguni, um luftskipanin og trýstskipanin ikki virkaðu?
11. Grikska verjumálaráðið vil ikki siga, um ætlanin var at skjóta flogfarið niður, um tað kom inn yvir Athen. Men hví vil verjumálaráðið ikki siga, hvørjir teir báðir jagaraflogskipararnir vóru? Hava myndugleikarnir kortini okkurt, sum teir dylja?
12. Hví vilja griksku myndugleikarnir ikki vátta upplýsingar um, at jagaraflogførini tóku film av kýpriska flogfarinum?
13. Sambært griksku myndugleikunum fekk kýpriska flogfarið boð um at fara niður í 14.000 fóta hædd, so tað kundi loysa trupulleikarnar við luftskipanini. Men hví fór flogfarið seinni upp í 34.000 fóta hædd? Hildu flogskipararnir, at brekið var umvælt?
14. Tað sama flogfarið hevði trupulleikar við trýstskipanini í fjør, og sambært grikska blaðnum Kathimerini noyddist tað at neyðlenda á Rhodos í 2003, og seinni bleiv tað afturhildið eitt samdøgur í Newcastle í Bretlandi. Fólk, sum flugu við flogfarinum fyri nøkrum vikum síðani, siga, at tá vóru trupulleikar við trýstinum. Hvussu ber tað til, at flogfarið slapp at flúgva?
15. Nær varnaðist floghavnin í Athen, at okkurt var á vási, og hví hevði floghavnin einki samband við flogfarið fyrr enn ein hálvan tíma eftir, at tað var komið í grikskt loftrúm?
16. Sambært blaðnum Khatimerini hava loftferðslumyndugleikarnir í Kýpros ikki tann neyðuga førleikan á summum økjum, og tí eru teir ikki mettir sambært ES-reglunum. Hvussu álítandi eru so tey flogloyvi, sum teir hava givið flogfelagnum Helios?
17. Helt Helios Airways, sum er tað fyrsta privata flogfelagið í Kýpros, altjóða ásetingarnar um flogtrygd?

Millum annað hesir spurningarnir skulu hava svar fyri endaliga at staðfesta, hví 121 fólk lótu lív við Grammatiko norðan fyri Athen seinasta sunnudag.

# Ísrael fer ikki av Vestara Áarbakka

**Útlitini fyri einari varandi semju ímillum ísraelsmenn og palestinar eru ikki tey bestu**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, ger nú greitt, at Ísrael hevur ongar ætlanir um at flyta tey jødisku niðursetufólkini av Vestara Áarbakka.

Fyrr hevur Sharon sagt, at avgerðin at flyta niðursetufólkini úr Gaza kann rudda slóð fyri semju við palestinararnar, men eygleiðarar siga, at avgerð hansara um at varðveita niðursetubygdirnar á Vestara Áarbakka kann gerast ein stórur meinbogi fyri einari semju við palestinar.

So seint sum seinasta mánadag segði palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, at ísraelska afturtøkan úr Gaza átti eisini at umfata niðursetubygdirnar á Vestara Áarbakka, og at Ísrael eigur at taka seg aftur til markið frá 1949. Men tað kemur ikki upp á tal, sigur Sharon.

Ísrael hersetti Gaza og Vestara Áarbakka undir seksdagakrígnum í 1967.



*Ariel Sharon: – Tað kemur ikki upp á tal at flyta niðursetufólkini av Vestara Áarbakka*

*Mynd: Reuters*